Lagt til rættis: Eydna Skaale
Myndir: Sunva Eysturoy Lassen

# Haute couture

**Haute couture** er franskt og kann umsetast: »fínasta seymingin ella besta sniðgevingin«. Hetta er eitt hugtak, ið sipar til tað allar besta innan sniðgeving og seyming.

Í Fraklandi er **Haute couture** eitt vart hugtak, t.v.s., at tað eru bert nakrir fáir sniðgevar, ið røkka einum serliga høgum støði, ið kunnu kalla framleiðslu sína **Haute Couture**.

Men hugtakið **Haute Couture** verður eisini leysliga nýtt um øll mótaklæðir, sum verða sýnd fram á heimsins størstu mótapallum, ikki bert í Fraklandi, men eisini í m.a. London, Milano, New York og Tokyo .

Allir mótapallar kring heimin hava fyri heyst og vetur víst fram frakkar og síðar jakkar í øllum sniðum. Tíbetur er úrvalið eisini stórt her heima


Myrkagrønur skinnfrakki frá
Guðrun & Guðrun: 3200,-


Frakki frá Samsøe & Samsøe,
Gellan: 2299,-


Jakki frá Only,
Vero Moda: 399,-


Svartur frakki við stórum kraga frá Soul Made, Diva: 2799,-

Oversized troyggjur og bundnir kjólar eru eitt absolutt mást í vetur. Antin við leggings, gamasjum ella smølum buksum innanundir. So um tú ert fim við stokkunum er bara at kasta uppá. Ert tú ikki, kans tú tíbetur vera við allíkavæl, tí úrvalið er stórt


Bundin kjóli við mynstri og broderíi frá Odd Molly,
Klivin: 1439,-


Stór troyggja við holmynstri frá Thomas Burberry,
Gellan: 1399,-


Bundin kjóli við plissering frá CCDK,
Margerita: 1110,-


Grá oversized troyggja við stórum mynstri frá Soul Made,
Diva: 1399,-

Í vetur mást tú eiga ein stuttan jakka. Hann skal helst vera av leðri, men stuttir toyjakkar kunnu eisini nýtast. Tað týdningarmesta er, at hann ikki hevur rendur sum stramma hann ov nógv inn um miðjuna og um ermarnar


Stuttur quiltaður leðurjakki frá Philosophy Blues Original,
Margerita: 3900,-


Stuttur leðurjakki við lummum og lekrum detaljum frá Modstrøm,
Juniik, 2000,-


Violettur toyjakki við knappum, snarlási og belti um taljuna frá Nümph,
Kléo: 800,-


Reyður og bleytur leðurjakki frá Red Rabbit,
Trend Floor: 2999,-

Niðurdeilar hava í eina tíð verið stuttir, heilt stuttir –og ert tú ung, kanst tú enn nýta stutt. Men ert tú eldri, er longdin á veg niðureftir aftur. Niðurdeilar skulu í øllum førum koma niður á knæð, og heilt nýggja longdin er niður á leggin. Sniðið skal antin vera vítt ella heilt stramt, sum vit minnast tað frá 80'unum


Niðurdeilur við stórum, lillaðum mynstri frá
Vero Moda: 249,-


Einlittur, lekaður niðurdeilur frá Soaked in Luxury,
Handilskjarnin: 359,95


Ballónniðurdeilur við vøkrum smálutum frá Day Birger et Mikkelsen,
Klivin: 1099,-


Bláur niðurdeilur við knappum allan vegin niður frá Nümph,
Kléo: 499,-